Fyrsti nýbygningur á Skipasmiðjuni á Skála í 17 ár:

# Byrja at smíða um tríggjar vikur

**Um tríggjar vikur byrja tey á Skipasmiðjuni á Skála at smíða nýggja skipið hjá P/f Thor í Hósvík. Í aðru viku kemur stálið heim, og í oktober koma pólendingar higar at sveisa skrokkin**



*Í løtuni arbeiða tey við at rudda høllina, soleiðis at arbeiða at smíða skipið kann byrja um tríggjar vikur. Dánjal Andreasen sigur, at á skipasmiðjuni eru tey ógvuliga spent eftir at byrja*

*Mynd Jens Kr. Vang*

SKIPASMÍÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Á Skipasmiðjuni á Skála hava tey úr at gera í hesum døgum. Tey gera klárt til at kunna byggja fyrsta skipið á Skála í 17 ár.

Tað var mánadagin 17. juli í ár, at Thor kunngjørdi stóra byggisáttmálan teir høvdu gjørt, um at lata tað stívliga 55 metrar langa og 12,5 metur breiða skipið byggja í Føroyum.

Í løtuni rigga tey høllina til og har er eitt sindur at tríva í. Høllin skal ruddast og hampast, og í heila tikið gerast klár til at brúkast.

Dánjal Andreasen er leiðari á Skipasmiðjuni á Skála og hann fortelur, at á skipasmiðjuni eru fólk spent upp á at fara undir at byggja.

– Hetta er ein sólskinssøga hjá okkum, og fólk eru ótrúliga spent eftir at sleppa at byggja nýggja skipið, sigur Dánjal Andreasen.

**Póllendingar sveisa skrokkin í oktober**

Næsta stigið verður síðani at fáa alla útgerð til vega, og har er eitt sindur av amboðum, sum skulu fáast til taks.

Í aðru viku kemur stálið heim og skal skerast til. Tað verður gjørt eftir tekningum, sum eru teknaðar í Póllandi og í Havn.

Samstarvsavtala er fingin í lag við ein pólskan undirveitara, og tað eru eisini póllendingar, sum skulu gera skrokkin til skipið á Skipasmiðjuni á Skála.

Hetta er ein serlig avtala tey hava gjørt, men samstundis eisini ein neyðug avtala, tí stálskipasmíð er ikki til longur á okkara leiðum.

Tí er tað, at eini 25-60 póllendingar koma higar til landið í oktober mánaði at gera skrokkin, meðan teir byrja at strekkja kjølin longu um tríggjar vikur.

Mett verður, at arbeiði til einar 100 føroyingar verður annars, og kemur hetta at umfata installatión og annað arbeiði.

Skipið sum Thor nú letur byggja á Skála skipasmiðju kemur ætlandi at kosta 75 milliónir krónur. Tá byggisáttmálin var undirskrivaður í juli ásannaðu tey hjá Thor, at tað ivaleyst hevði verið bíligari at bygt skipið í til dømis Kina ella Spania, men tá segði forstjórin, Hans Andreas Joensen, at tað er teirra meting, at tað í síðsta enda fer at loysa seg at byggja her á landi, tí tá kunnu teir vera vísir í at fáa tí røttu, skræddaraseymaðu loysnina.

---

Hópuppsøgn hjá Færøernes Kommando:

# 50 fólk uppsøgd í Mjørkadali

**Í dag fingu onki minni enn fimti fólk, sum dagliga starvast hjá Færøernes Kommando í Mjørkadali at vita, at tað framyvir ikki verður brúk fyri teimum har. Av 74 fólkum verða bara 24 fólk eftir**

UPPSAGNIR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í morgun klokkan átta fingu øll starvsfólkini hjá Færøernes Kommando handaðan ein brævbjálva. Í brævbjálvanum var eitt ark, har tey kundu lesa, at tey annaðhvørt vóru uppsøgd ella sleppa at halda á fram í arbeiðinum í Mjørkadali.

Dagliga starvast 74 fólk har, men í dag fingu 50 teirra at vita, at tað framyvir ikki verður brúk fyri teimum í Mjørkadali.

Ein minking í uppgávunum er beinleiðis orsøkin til, at Færøernes Kommando í dag má biðja so nógvum starvsfólkum farvæl. Tað merkir tó ikki, at tey frá í morgin eru arbeiðsleys, tí tað verður ikki fyrr enn 1. juli næsta ár, at øll tey uppsøgdu starvsfólkini endaliga mugu siga farvæl.

Í løtuni verður so arbeitt við, at flyta hesar til aðrar uppgávur hjá donsku verjuni, samstundis sum virksemið verður lagt um soleiðis, at tey 24 sum eftir eru megna uppgávuna.

Størsta broytingin hjá Færøernes Kommando verður, at um ársskiftið verður radarin á Sornfelli niðurlagdur, og tað verður farið undir eina nýggja skipan við teimum 24, ið eftir eru. Tann skipanin byrjar 1. januar 2008.

